# Samgongu-veljarar ynskja somu

**Nú tað stundar til val, verður dúgliga spekulerað í, hvør samgonga fer at spyrjast burturúr, tá dustið hevur lagt seg aftan á valorrustuna. Ein møguleiki, ið alt fleiri tosa um, er ein samgonga millum Sambandsflokkin og Tjóðveldið. Møguliga saman við einum afturat, um tað gerst neyðugt. Tað er kortini ein møguleiki, sum enn ikki hevur serligan áhuga millum veljararnar hjá hesum báðum flokkunum. Hinvegin tykjast veljararnir hjá samgonguflokkunum at halda upp á ABC-samstarvið**



VELJARAKANNING

*Jógvan Mørkøre*
*samfelagsfrøðingur*



Hvønn vilt tú helst, at flokkurin hjá tær samstarvar við? Nakað soleiðis varð spurt í veljarakanningini hjá Fynd fyri Sosialin fyri trimum vikum síðani.

Og svarið var ógvuliga greitt, um vit taka veljararnar hjá teimum trimum samgonguflokkunum. Í øllum trimum førunum høvdu teir samgonguflokkarnar á fyrsta og øðrum plássi. Tjóðveldisflokkurin var triðja val í øllum trimum førunum. Millum fólkafloksveljarar vóru tølini hesi: Fyri Sambandsflokkin 36 prosent, fyri Javnaðarflokkin 20 prosent og fyri Tjóðveldið 14. Millum sambandsveljarar vóru tølini: 38 prosent fyri Fólkaflokkin, 30 prosent fyri Javnaðarflokkin og 5 prosent fyri Tjóðveldið. Millum javnaðarveljarar: 34 prosent fyri Fólkaflokkin, 23 prosent fyri Sambandsflokkin og 19 prosent fyri Tjóðveldið.

Hjá tí fjórða av teimum trimum stóru flokkunum, Tjóðveldinum, var býtið nakað javnari, ikki minst sæð í mun til, hvussu tað plagdi at vera millum tjóðveldisveljarar. Hesuferð var tað so: 27 prosent høvdu mestan hug á Javnaðarflokkinum, 23 prosent søgdu Fólkaflokkin, og heili 17 prosent nevndu Sambandsflokkin. Hetta seinasta er kanska tað mest merkisverda í hesari kanningini. Hetta talið hevur fyri tað mesta ligið um 1 prosent. Onkra løtu er tað farið upp í 6 prosent. Men annars hevur tað ikki verið møguleika, ið fólk hava havt serliga frammalaga. Heilt aftur til 1988. Nú er talið á tjóðveldisveljarum, ið hava Sambandsflokkin fremst í huganum, tá ið samgongumøguleikar skulu umhugsast, lopið upp í 17 prosent.Tað óhugaliga hjá teimum er so bara tað, at tilsvarandi talið millum sambandsveljarar, ið hava Tjóðveldið fremst, ikki er hægri enn 5 prosent - hóast tað so eisini er meira enn tað vanliga eina prosentið. Í so máta fær Tjóðveldið nærmast krakk.

### Hvat slag av samgongu – og harvið politikk?

Í gomlum døgum vóru fýra sløg av samgongum. Sjálvstýris- ella heimastýrissamgonga, ella høgra- ella vinstrasamgonga. Í flestu førum við Sjálvstýrisflokkinum frá miðjuni afturat, so tað slapst upp um helvtarmarkið. Men síðani miðskeiðis í sjeytiárunum hava møguleikarnir verið fleiri. Tá funnu tríggir stórir flokkar saman, Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin. Tað merkisverda var, at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin, sum á pappírinum vóru diametralt mótsettir, kundu leita saman. Tað átti at verið sum eldur og vatn, tí ósemja var bæði í sjálvstýrismálum og í búskapar- og sosialmálum. Á pappírinum í øllum førum.

Síðani hevur alt borið til, ja sjálvt Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin hava kunna mynda landsstýri saman, hóast tað vardi nakað stutt. Av tí sama, so eru samgongumøguleikarnir ikki avmarkaðir til 4, men vilja í flestu førum vera minst tað dupulta talið aftaná valini.

Kortini kann tað vera áhugavert at hyggja at, um veljararnir hjá stóru flokkunum leggja seg í sama borð, tí vit fáa eina ábending, um tað er høgra-, vinstra-, sjálvstýris- ella sambandspolitikkur, ið liggur fremst í huganum.

Taka vit flokkarnar í høgra borði, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, so vístu veljararnir hjá flokkunum báðum á hvønn annan í 1988, tá ið borgarlig samgonga hevði sitið í fýra ár. Síðani hevur tað verið eitt sindur meira blandað. Tó nú tykist at fara at líkjast støðuni fyri skjótt tjúgu árum síðani. Eitt sindur løgið kortini at hesi tølini skulu fara upp, samstundis sum tað er blivið klandur millum flokkarnar báðar um skattalættapolitikkin, og eingin teirra hevur tað serliga frammalaga samanborið við støðuna til valið fyri fýra árum síðani. Veljarakanningin boðar heldur ikki frá nøkrum ógvusligum trýsti fyri skattalætta millum veljararnar hjá hesum báðum flokkunum.

Í vinstra borði hava tjóðveldisveljarar tað mesta av tíðini síðani 1988 havt Javnaðarflokkin fremst í huganum sum samgongufelaga. Undantakið er ein einstøk kanning, meðan fullveldisskútan

Fakta

| Í prosent | Dyggjastu undirtøku | Næst mest | Triðju mest |
|---|---|---|---|
| Fólkafloksveljarar | ABC: 35 | ADE: 6 | ACE: 5 |
| Sambandsveljarar | ABC: 47 | BCD: 4 | BDE: 4 |
| Javnaðarveljarar | ABC: 45 | ACE: 7 | CDE: 7 |